
havi góðar stundir. Klokkan er júst farin um middag og mítt flogfar fer ikki fyrr enn um fýratíðina seinnapart. Eg skal fyrst flúgva til Amsterdam í einum minni flogfarið og síðan í einum risa, einum Boeing 747-400, beinleiðis til Singapore. Meðan eg stytti mær stundir, síggi eg, at flogfarið hjá Atlantsflog er í Keypmannahavn. Av forvitni og longsli eftir at síggja landsmenn, so gangi eg móti básinum, har ferðafólkið hjá Atlantsflog heldur til. Eg kendi fleiri beinanvegin. Ó lufthavnini hitti eg eisini Borgny, konuna hjá okkara mætasta núlivandi langfara, Trónda Paturssyni. Sjálvandi spurdi eg eftir Trónda og frætti at hann nú aftur lá fyri at fara á ferð á leiðini kring Sulawesi í eystara parti av Indonesia. Eg fekk at vita, at teir millum annað skuldu kanna hval.

Tankarnir leitaðu aftur til Siggert niðri í taskuni. Tað er ikki so langt frá monnum millum Siggert og Tránd. Kanska hevur Tróndur nýtt Siggert sum fyrimynd. Hann hevur uttan iva hoyrt um brøgdini hjá Siggert í Sibiria. Kanska Siggert er beinleiðis neistin, íð kyknaði í Tróndi mong ár seinni. Sær Siggert meg nú, her eg nú skrivi, meðan regnið oysir úti í slævnu tropunáttini, so kann eg heilsa honum, at Trondur hevur ikki gjørt sær fyri skommum í hansara fótasporum.

Lat meg skoyta upp í her, at tá eg var komin aftur til Singapore, hitti eg skiparan á »Thor Inger.« Teir vóru júst komnir aftur frá Sulawesi og har var gylt av smáhvali at síggja, fortaldi hann mær, tá eg greiddi frá Tróndi Paturssyni.



S. O. Patursson



Pílarnir sýna mína ferð og strikurnar ferðirnar hjá Siggert út í tað tá heilt ókenda Sibiria.

Á veg til Sibiriu

Dagurin er nú fleiri fleiri tímar eldri, tað skímir og stóra flogfarið hjá hálendska flogfelagnum, KLM, lættir úr Shipcol lufthavnini í Amsterdam. Leingi koyrir tað eftir breytini og tað kennist sum flogfarið næstan ikki orkar at lyfta sær á. Upp koma vit í øllum góðum, júst í tí løtu, tá sólin ger seg til at kava í vestri. Skjótt er myrkt og vit síggja ljósini frá bygdum og býum í Týsklandi. Skjótt gongur eisini eystureftir. Fjarstøðan millum lond í Europa minkar burtur í einki, tá tú hevur trettan tímar fyri framman í luftini. Eg siti og hyggi út eina løtu, meðan býirnir í neðra renna framvið. So leitar hondin niðurí taskuna eftir Siggerti.

Eg lesi eina løtu uttan at hugsa um hvar vit eru. Kenni ikki kósina. Lesi aftur drúgva stund og nú kveiti eg upp á skermin undir loftinum frammanfyri meg. Her sær tú eitt kort og kósin er sett. Vit halda leiðina yvir Polen og móti Hvítarusslandi. Eg síggi Kiev fyri framman og Moskva er eisini longur norðuri í ein landnyrðing. So gongur tíðin. Siggert læsir meg fæstan í bókini.

Eg havi fylgt honum úr Kirkjubø til Keypmannahavnar, til Svøríki, norður til sámarnar. Síðan hevur leiðin gingið til Sankta Pætursborg, til Moskva og leiðina eystur í Uralfjøllini til Jekarinburg. Hann helt leiðina fram norður í Ob víkina og eg fylgi við hansara spennandi lívi sum einbúgvi á eini oydnari oyggj í hesi vík, tá flogternurnar koma órógvandi við mati. Siggert helt fleiri mánaðar til á hesi oyggj, har hann veiddi, kannaði urtir og grøs

Ural og Jekarinburg

Nú dagar Uralfjallaketan fram á skerminum og knappliga eisini eitt býarnavn, sum eg beri kenslu á. Jekarinburg. Tað var júst her, at veruliga ferðin hjá Siggert byrjaði í Sibiria.

Eg hyggi út gjøgnum gluggan. Tað er stjørnuklárt, ikki eitt skýggj at síggja og mánin er frammi. Útsýnið er stórbært. Óteljandi stjørnur blinka til mín. Klárt er at hyggja út í rúmdina, her í 10 kilometrahædd, væl hægri enn hægsta fjall i heiminum. Heilt úti undir vaðingini niður móti jørðini gerst eitt sindur támut. Eg síggi kendar stjørnumyndir. Í neðra sæst velduga Sibiria liggja kavaklætt og spegla sær í mánalýsinum.

Bókin hjá Siggert fær ein heilt annan týdning her upp. Eg byrji at fata hesar óendaligu víddir og hví Siggert kendi seg so drignan at hesum at hann næstan ikki vildi koma heimaftur.

Onkunstaðni har norðuri liggur Jekarinburg. Nú er longur millum ljósini enn í Europa. Eg kenni meg einsamallan her uppi millum skurrandi hálendingar. Eg hugsi um Siggert, um kirkjubømannin. Man hann ikki hava kent seg einsamallan í hesum velduga landið. Man ikki dirvið hava svikið viðhvørt?

Úr Jekarinburg her helt Siggert leiðina við toki til Tjumen, og hagani við eini handilsslupp, hjá brøðrunum Wardropper, oman eftir Ob ánni, heilt út í Ob víkina, norður móti Íshavinum.

Góður frásøgumaður

Hálendska KLM flogfarið snarar í ein landsynning, meðan Siggert í mínum tonkum er á veg norður eftir OB ánni. Reint landafrøðiliga, so skiljast okkara vegir nú. Síðan eg sá Jekarinburg á skerminum í flogfarinum, havi eg kent meg nógv nærri Siggerti. Eg havi leitað aftur á síðurnar í bókini og mint meg á hendingarnar honum var fyri fyrsta partin av síni ferð í Vestursibiriu.

Sum rithøvundur er Siggert heilt framúr. Hann nýtir ikki nógv orð. Hann er knappur í frásøgustilinum og tað er ógvuliga sjálvdan, at hann keðir lesaran. Bókin er ikki meira enn knappar 400 síður, við rímuliga stórum stíli. Í bókini er fleiri tekningar, sum geva eina góða mynd av hvat Siggerti var fyri. Tá eg sigi, at bókin ikki er stór, so hugsi eg um, at aftanfyri bókina liggja hendingar frá eini seks ára langari ferð. Eg trúgvi, at Siggert hevur hugsað; »Lat meg ikki keða lesaran við ov drúgvum frásagnum.« So væl liggur fyri at skriva, at hann hevði kunna skrivað eitt heilt bókaverk um hesa ferð.

Vit nærkast nú Himmalaya og eg hugni mær óført við bókini. Siggert hevur góð eygleiðaraevnir. Hann leggir merki til teir smáu lutirnar. Fólkalívsmyndirnar eru knappar og neyvar, men tær siga nógv. Tað er fløvandi at kenna hitan og tokkan, hann hevur til tey ymisku fólkasløgini, hann hittir. Siggert ferðast í Sibiria bert fá ár eftir at Darwin hevði útgivið bókina um uppruna djóranna. Siggert er kristin maður og hann lýsir fólkini í Sibir við kristnum brillum. Ikki soleiðis, at hann beinleiðis sær nakra trongd vil at veiða menn í Sibiria, men tað einasta sum gevur honum andstygd á hesi longu ferð er heidna gudsdyrkanin. Hann hevur stóra virðing annars fyri mentanini hjá hesum fólkum og hann samanber eisini vestureftir. Hann vísir á, at øll menniskju kunnu læra av hvørjum øðrum.

Tá Siggert er komin norður í Ob víkina er ógvuliga lítið sjónligt eftir av mannum, sum ferðabúgvin fór úr Kirkjubø. Hann er latin í sum tey lokalu. Hann skilir russiskt og eisini nøkur orð av málinum hjá teimum ymisku fólkasløgunum. Hann er væl um sátt við tey flestu og hann dugir at fara við fólki. Væl liggur fyri at vinna sær vinir, sum kunnu verða hollir, tørvar honum hjálp. Hann er ein mætur maður í Sibiriu, skilt á tann hátt, at hann hevur virðing millum tey sum hava nakað at siga og hann hevur eisini virðing millum tann minni menta. Siggert var góður veiðumaður og fleiri ferðir ger hann veiðubrøgd, sum økja um hansara tygn millum mannað. Millum annað veiddi hann bjarnir. Slíkt kravdi dirvi

At lesa um hvussu hann spakuliga fer at dáma matin upprunafólkinum er áhugaverdur lesnaður. Hann dugir at síggja, at júst sum upprunafólki tilger matin, tað er besti hátturin.. 1000 ára royndir hava lært hesi fólk, hvussu tey skulu trivast og koma undan í villu oyðuni.

Vit eru nú komnir suður í stóra Gangesdalin í India. Her er líggjari og eg leggi troyttur bókina aftur í taskuna.

Áðrenn eg sovni sveima tankarnir eina løtu afturat um Siggert. Hann vóni eg at hitta einaferð. Eg havi so nógv at spyrja hann um.

Eg hugsi: »Hvussu ber tað til at eg ikki havi sæð ein stav í føroyskum skúlabókum um Siggert. Eg var vaksin maður, áðrenn eg hoyrdi fyrstu ferð um Siggert. Vit lærdu í skúlanum um øll møgulig fólk úti í heim, sum vit einki samband høvdu við. Hvørt mansbarn í Føroyum veit um missionerin Dr. Livingstone og Stanley. Siggert gjørdi eina ferð, sum var minst líka áhugaverd, fólkalívsfrøðiliga og landafrøðiliga. Kanska er forkláringin, at hann var okkum ikki nóg fremmandur.«

Tað er gleðiligt, at bókin um ferð Siggerts í Sibiria nú er týdd til føroyskt. Vónandi hevur hon eisini fingið pláss í skúlunum. Hon er eins spennandi lesnaður og allar tær kendu, sum longu eru týddar til føroyskt um teir ensku slóðbrótararnar, sum leitaðu nýtt land upp í farnum tíðum.

Leðurryggurin á bókini hjá Siggert sæst fram um tær óinnbundnu á reolvegginum, nú eg leggi seinastu hond á hesa grein. Hon hevur plágað meg seinastu dagarnar, ja, næstan kitlað í fingraspísjunum. Kanska ein dag standi eg í Ob víkini og njóti sama útsýnið sum Siggert fyri góðum 100 árum síðan og kanska tá vit hoyra upp aftur meira um landið hjá Siggert, Sibiria.

Nú lýsir. Heilt úti undir vaðingini standa Venus og Jupitet sum morgunstjørnum. Tær eru stórar í morgun og tær eru tær einastu sum enn ikki víkja fyri tí risandi sólini. Hesa sjón man Siggert hava sæð mangarferðir undrandi.